tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Fullan rætt til óhefta kanning

*Oddagrein*

NÚ verður bíðað eftir, hvat fer at henda víðari í málinum viðvíkjandi landsstýrismanninum Signar á Brúnni. Tá landsgrannskoðarin legði fram tilfar sítt í sambandi við m.a. roknskapin hjá SVF komu krøv fram í almenna orðaskiftinum um, at landsstýrismaðurin átti at leggja frá sær. Hetta endaði við, at landsstýrismaðurin heitti á løgmann um at verða loystur úr starvi fyribils, meðan ein óheft kanning verður gjørd av málinum. Landsstýrismaðurin kendi seg fullkomiliga ósekan fyri teimum ákærum honum vórðu fyri. Síðani loysti løgmaður landsstýrismannin úr starvi, men tað vísir seg, at landsstýrismaður kann ikki verða loystur úr starvi fyribils, og heldur ikki kann løgmaður skipa fyri eini kanning uttan víðari. Tað skal landsstýrismálanevndin taka stig til, og hesum hevur formaðurin í nevndini longu víst aftur. Hvørjir eru so møguleikarnir hjá Signari á Brúnni at verða reinsaður fyri teimum órættvísu ákærum hann metir eru reistar móti sær og síni embætisførslu? Ein er, at 13 tingmenn biðja tingformannin um seta eina kanning í verk.

NÓGV er sagt og skrivað um Signar á Brúnni. Eisini á hesum stað hava vit víst á mál, sum enn standa óloyst. Men tað er eisini ein sannroynd, at sami landsstýrismaður í sambandi við eitt nú mentamálini hevur víst eitt sera gott handalag og virkisfýsni. Hann hevur brent fyri at fáa okkum ein meira virknan mentanarpolitikk. At hann so á hesum øki eins og á skúlaøkinum er sligin á fingrarnar av sínum egnu, her serstakliga fíggjarmálaráðharranum, er sjálvandi komið seg illa við. Vit síggja aftur og aftur, hvussu málsøki og nú eisini landsstýrismenn koma í rasshaft orsakað av, at pengar ikki mugu játtast til lívsneyðug mál, eitt nú til at liva upp til nýggju krøvini til at fylla út karmarnar í fólkaskúlalógini, tí sparast skal upp til fullveldi. Hetta er einki nýtt. Vit síggja tað eisini á sjúkrahúsøkinum. Rætt skal vera rætt. Tað eigur og má vera rætturin hjá landsstýrismanninum, at hansara mál verður kannað. Hava løgmaður og tjóðveldisfólkini lovað honum tað undir skeivum fortreytum, so eiga hesi at fáa 13 tingmenn at biðja tingformannin um eina óhefta kanning.

HVØRJA niðurstøðu man enn kemur til í hesum sera fløkta máli, so er greitt, at vit her eru vitni til metingar og tulkingar av eini nýggjari stýrisskipanarlóg, og har tað eisini kann vera torført at skilja millum jura og politikk. Flokkurin hjá Signar á Brúnni hevur havt landsfund um vikuskiftið. Áhugavert verður at frætta, hvørja niðurstøðu fundurin ella tingmanning og landsstýrismenn eru komnir til í sambandi við óheftari kanning av øllum „Signar á Brúnni málinum“. Kann tað hugsast, at flokkurin longu hevur avgreitt málið einaferð med alla? At floksfelagar hansara síggja hann sum eina forðing fyri fullveldisætlanunum? At tá skúlamálaráðharrin roynir at ganga skúlafólkinum á møti í sínum krøvum, tá hevur hetta fingið øði í partamannin á kassanum í Tinganesi! Seinasta orðið eigur ikki at verða sagt í hesum máli. Tingið eigur at geva Signari á Brúnni ta kanning, sum hann hevur biðið um. Allur ivi eigur at koma tí skuldsetta til góða, eisini í hesum máli. Og uttan mun til flokspolitiskan lit.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Opið bræv til løgmann

Í fimmaranum har evnið var, at Signar á Brúnni hevði lagt frá sær, vóru tygum í útvarpstovuni saman við Hergeiri Nielsen, ið er formaður í løgtingsgrannskoðanarnevndini. Har segði Hergeir Nielsen, at tað var gerandiskostur, at Stýrisskipanarlógin varð brotin. Tygum høvdu hvørki svar ella rættleiðing til úttalilsið hjá Hergeiri Nielsen. Hetta er ein álvarsom skuldseting, sum í grannlondum okkara hevði verið kannað alt fyri eitt.



Í Krosskasti dagin eftir, har evnið var verkbannið í Fólkaskúlanum, segði tingmaður Fólkafloksins Jógvan á Lakjuni, at tað var ikki neyðugt hjá lærarum at fylgja nýggju Fólkaskúlalógini út í æsir. Hetta tilmæli frá tingmanni er ógvuliga álvarsamt, og politikkarar í okkara grannalondum høvdu víst slíkum úttalilsi frá sær, men enn hevur eingin tikið málið upp her heima.

Í Føroyum er 9 ára undirvísingarskylda. Hóast hetta, so hava fleiri børn nú ikki fingið undirvísing í skjótt 4 vikur. Landsstýrismaðurin í skúlamálum góðtekur, at føroyskir skúlanæmingar ikki verða undirvístir. Í øðrum londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, hevði støðan verið ógvuliga tyngjandi fyri ein skúlamálaráðharra, og eydnaðist honum ikki at loyst málið, so hevði tað helst fingið fylgjur fyri ministaran.

Spurningar mínir til tygara, harra løgmaður, eru

1. Kann løgmaður góðtaka, at tað er gerandiskostur, at Stýrisskipanarlógin verður brotin ?
2. Kann løgmaður góðtaka, at tingmaður Fólkafloksins mælir lærarum frá at fylgja landsins lógum ?
3. Kann løgmaður góðtaka, at landsstýrismaðurin í skúlamálum sær millum fingrarnar við, at lógin um undirvísingarskyldu verður brotin?

**Við hávirðing**
**Eyðólv Dimon**

Viðmerking:

# Tórshavnar býráð skal sjálvandi eiga Tórsvøll

Næstseinasta leygardag hevði Sosialurin forvitnisliga samrøðu við Heðin Mortensen um Tórsvøll.

Heðin sigur, at skal Tórsvøllur gerast liðugur, er einasta gongda leið, at Tórshavnar kommuna yvirtekur verkætlanina. Býráðið er einasti parturin í málinum, sum hevur pening og orku at gera stadionið liðugt.

Tórsvøllur eigur at vera til gagns fyri allar partar av ítróttarlívinum í Havnini og øllum Føroyum – eisini frælsa ítróttinum.

Sum er elvir Tórsvøllur bert til stríð millum lokalu kreftirnar í málinum, og Tórsvøllur er í dag ein skomm fyri Havnini, sigur Heðin.

Fyri stuttum hevði mentanarnevndin fund um Tórsvøll og niðurstøðan var, at eitt tilmæli verður latið Býráðnum, har mælt verður frá, at rennibreyt verður gjørd um Tórsvøll.

Heðin Mortensen mælir býráðslimunum til at hugsa seg væl um, áðrenn teir taka nakra avgerð viðvíkjandi rennibreytini.

Álvaratos. Setti Býráðið ikki tórsvallarnevndina við tí arbeiðssetninginum at gera eitt stadion við rennibreyt í Gundadali? Er økið ikki fyri nógvum, nógvum árum síðan lagt av til eitt stadion, og hví letur Býráðið nú Gundadal upp í hendurnar á nøkrum fáum fótbóltsmonnum?

Sjálvandi skal Býráðið eiga Tórsvøll, hetta er einasta borgan fyri, at vit fáa eitt stadion, sum sjálvandi skal liggja í Gudnadali. Býráðið eigur jú hinar báðar fótbóltsvallirnar. Tað er heilt ófatiligt, at eingin býráðslimur uttan Heðin Mortensen alment hevur funnist at núverandi verkætlan.

Kenni ikki ein persón í Havn, sum sigur seg vera nøgdan við avrikið í Gundadali. Fólk eru í øðrini um, at betongklossar hava oyðilagt okkara vakra Gundadal, sum einaferð skuldi gerast eitt prýðiligt stadion.

Einasta loysnin er at taka tórsvallarnevndina av, og tá tað er gjørt, fer Býráðið sjálvt til verka.

Allar fyrst skulu áskoðarplássini niðan ímóti høllini á Nabb takast niður og sprongt verður fýra metrar inn. Síðani verður eitt áskoðaraskýli við taki gjørt vakurt inn í lendið. Áskoðarplássini suðureftir skulu burtur, so vit aftur síggja alt virksemið, sum fer fram í Gundadali. Vit hava framvegis nógmikið av áskoðarplássum.

Síðani verður hildið fram, til vit um fá ár hava eitt vakurt stadion sum »allir« borgarar í Havnini eru fegnir um.

Tað er mín vón, at Býráðið ikki tekur undir við tilmælinum frá mentanarnevndini um ikki at gera rennibreyt um Tórsvøll.



Ónøgdin frá fólkum, sum hava áhuga í frælsa ítróttinum og renning yvirhøvur, fer altíð at spøkja aftur, tí má og skal Býráðið halda seg til upprunaligu ætlanina. Alt annað er órættvíst.

Lesi í Sosialinum í dag, mikudagin 29. mars, at Torfinn Smith býráðslimur sigur, at ráð eru ikki til rennibreyt, og tvinnar barnaansing upp í tórvallarmálið.

Hr. Tórfinn Smith. Kjarnin í tórsvallarmálinum er, at Býráðið hevur nýtt milliónri til fyrireikingar til eitt stadion í høvuðsstaðnum. Hetta er eitt inniligt ynski frá øllum frælsa ítróttinum og øllum skúlunum í høvuðsstaðnum. Býráðið hevur sett eina tórsvallarnevnd mannaða við ÍSF formanninum, landsstýrisumboði, umboði fyri Fótbóltssambandið og umboði fyri Býráðið. Málsetningurin hjá nevndini er at gera eitt stadion í Gundadali.

Nú ætlar Býráðið at hálsa um og lata økið, sum er avsett til stadion upp í hendurnar á fáum fótbóltsmonnum.

Ófantalig betongelementir standa nú á økinum, sum Býráðið sjálvt hevur sprongt og planerað til rennibreytina.

Tað er óskiljandi, at Tórfinn Smith ikki skilur hetta.

Torfinn Smith, stadionið í Havn skal liggja í Gundadali, tí har eru hallirnar, fótbóltsvallirnir og svimjihøllin. Hví skal besta økið í Gundadali liggja steindeytt størsta partin av árinum?

Einasta rætta er at Býráðið sjálvt yvirtekur Tórsvøll og arbeiðir víðari við upprunaligu ætlanini.

Tá fáa vit bestu loysnina, og verið vís í tí, tá verða øll nøgd, eisini fótbólturin, sum eisini fær gleði av rennibreytini.

Poul Michelsen biður í sama blað um arbeiðsfrið. Poul fær arbeiðsfrið, um hann arbeiðir eftir málsetninginum hjá allari tórsvallarnevndini, og tað er at gera eitt stadion í Gundadali.

**Vagnur Michelsen**

**www.sosialurin.fo**



Tryggingarfelagið Føroyar ynskir Neistanum tillukku við meistaraheitinum




TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR HØVUÐSSTUÐUL